Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Sambýlini á Mýruni 4 -6, 188 Hoyvík

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna til setan 1. september ella eftir nærri avtalu.

Sambýlini á Mýruni 4 -6 eru tvey hús . Her búgva í alt 9 fólk, ið hava brúk fyri hjálp at skipa sítt heim til eitt gott og trygt stað at búgva.

Starvfólkini eru 10 í tali og rokera ímillum húsini í eini fastlagdari arbeiðsætlan. Uppgávurnar hjá starvsfólkunum er at stuðla og vegleiða búfólkunum til at klára seg í egnum heimi og at stimbra til avbjóðingar í vanliga lívinum. Vit leggja dent á virðing.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um Pedagogur, ið frammanundan eru tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumannasetanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin pedagogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til leiðaran, Jensu Højgaard Poulsen, á telefon 211478.

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

Sambýlið á Mýruni 4-6
Á Mýruni
188 Hoyvík
Stílað: Jensa Højgaard Poulsen

**Umsóknarfreist: 21. juli 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo / leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 360000, Faks 360001, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



**Føroya Studentaskúli og HF-skeið**
Hoydalar · FO-188 Hoyvík
Telefon 312973 · Telefax 318624
Teldupostur skrivstovan@hoydalar.fo
Avgreiðslutíð: Kl. 08.00 - 15.30

**Endurlýsing:**
**Skúlatænari til Føroya Studentaskúla í Hoydølum.**

Eitt starv sum skúlatænari er leyst at søkja á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði frá **15. august 2008** ella skjótast til ber.

**Uppgávur:**
Uppgávurnar eru: Umsjón við og røkt av bygningunum hjá stovninum, at røkja økið uttan um bygningarnar, eftirlit við hita-, vatn- og elskipan skúlans og at rigga til høli í sambandi við próvtøkur og onnur tiltøk og at vera til handa í dagligu viðurskiftum skúlans. Skúlatænararnir arbeiða í skiftandi vaktum og tí koma skeivar arbeiðstíðir regluliga fyri. Á skúlanum koma frá 1. august at starvast 3 skúlatænarar. Nýggi skúlatænarin vísir til verandi 1. skúlatænari, ið er leiðari fyri skúlatænararnar og reingerðarstarvsfólkið.

**Førleikar**
Tann, ið settur verður eigur at hava handverkaraútbúgving, gott yvirlit og góð evni at samstarva. Ávísur telduførleiki er ein fyrimunur. Fyri tann rætta persónin er talan um eitt spennandi og fjølbroytt starv við nógvum avbjóðingum.

**Løn**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Handverkarafelag/ Landsfelag Handverkaranna. Starvið verður at seta frá **15. august ella skjótast til ber.**

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Mikkjal Helmsdal, rektara, telefon 312973/218404 ella Holgar Johansen, skúlatænara, fartelefon 214613.

Umsóknir við prógvum, viðmælum og frágreiðingum um arbeiðsroyndir skulu sendast til Føroya Studentaskúla og HF-skeið, Sanatoriivegur 1, FO-188 Hoyvík, ella sum teldupostur til mikkjal.helmsdal@skulin.fo og skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi **hósdagin 10. juli, kl. 12.00.**



Veitst tú eina góða?
Ring til Sosialin tlf 341800





Lesið Sosialin



FISKI- og TILFEINGISMÁLARÁÐIÐ

**Føroya Skipaskráseting**

Vegna summarfrí verður stongt frá 24. juli 2008.

Opið verður aftur mánadagin 4. august 2008.

Skjøl til skipaskrásetingina kunnu í hesum tíðaskeiði latast inn í móttøkuni hjá Fiski- og Tilfeingismálaráðnum, Heykavegur 6A, 100 Tórshavn.



**Koyri-kort?**

Teoriskeið til persónbil byrjar **mánadagin 7. juli kl. 17.00**

Teoriskeið til motorsúkklu byrjar **týsdagin 8. juli kl. 19.30**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**John A. Christiansen tel 21 47 75**

**Rúni Christiansen tel 21 47 65**

Jekaragøta 10 • Tórshavn



Fólk søkist

Søkt verður eftir vaktarfólki til vaktarleiðina í Eysturoynni.

Rein revsiváttan og koyrikort er ein treyt. Nærri fæst at vita hjá vaktleiðaranum tlf. 50 50 48 ella stjóranum tlf. 50 50 61. Umsøkn skal sendast til: ansni@ansni.fo

ANSNI
TRYGDARFELAG

POSTBOKS 2032 • 165 ARGIR
TELEFON 505050 / 505061
ANSNI@ANSNI.FO • WWW.ANSNI.FO



Frá **HOTEL NORÐ**

**Sunnudags døgurði:**

**Forrættur** - Fesk súpan við heimabakaðum breyði
**Høvuðsrættur** - Rullusteik og oksafilét
**Omaná** - Køkuborð við kaffi









Sosialurin -har tað hendir